


# Baker Hughes koyrir enn fleiri starvsfólk til hús

**Jógvan Hugo Gardar**

23.04.2015 - 09:11

Oljan.fo

Amerikanska veitingafyritøkan Baker Hughes hevur fyri ikki so langari tíð boða frá at tey noyðast at koyra fólk til hús, tí lági oljuprísurin ger at tey fáa færri uppgávur. Nú boðar Baker Hughes frá at tey noyðast at koyra 3500 afturat til hús. Tað merkir at fyritøkan minkar um starvsfólkatalið við tilsamans 10.500. Tað svarar til at Baker Hughes skal minka um talið á starvsfólkum við umleið 17 prosentum, skrivar Houston Business Journal.

Baker Hughes er at finna um stóran part av heiminunm, og eitt av londunum sum nú merkja at tað skal sparast, er í Noregi, har fyritøkan í dag hevur 1400 starvsfólk í Tananger, uttanfyri Stavanger. Hetta skrivar Offshore.no.

Baker Hughes hevur eisini gjørt avtalu um at leggja saman við Halliburton.